# Strandferðslan aftur nú í fíggjarligari neyð

**Hon fær brúk fyri nakrar milliónum afturat í ár, annars mugu bæði sigling og koyring skerjast**

STRANDFERÐSLA
*Áki Bertholdsen*



*Antin fáa vit eina eykajáttan, ella mugu vit skerja bæði sigling og koyring og tað vilja politikarar ikki, sigur Kristian Davidsen, stjóri á Strandferðsluni*

Strandferðslan er aftur í ár í fíggjarligum trupulleikum.

Longu nú, áðrenn árið er hálvrunnið, er tað greitt, at Strandferðslan má fáa nakrar milliónir afturat, skal hon ikki noyðast at skerja bæði sigling og koyring rættiliga nógv.

Strandferðslan er júst nú liðug fyri roknskapin fyri fyrsta ársfjórðing í ár.

– Eftir teimum metingum, vit hava gjørt út fra tí, koma vit at mangla 4,3 milliónir afturat í ár, fyri at kunna varðveita tað virksemið, vit hava, sigur Kristian Davidsen, stjóri á Strandferðsluni.

Men tað kemur ikki óvart á strandferðslustjóran, at játtanin í ár fer ikki at halda.

Tað hevur Strandferðslan vita leingi og fyrr í ár var eisini ætlanin at seta sparitiltøk í verk fyri at kunna halda játtanina.

Men ein stórur trupulleiki er, at politisk myndugleikin noktaði Strandferðsluni at seta tey sparitiltøk í verk, sum ætlanin var at seta í verk fyri at fáa játtanina at halda.

Og nú roknskapurin fyri fyrsta ársfjórðing í ár er gjørdur, vísir hann, at at Strandferðslan hevði eitt hall upp á 1,6 millión tíggjar teir fyrstu mánaðirnar í ár.

– Út frá tí hava vit mett, skulu vit varðveita tað virksemið vit hava, tað, sum eftir er av árinum, koma vit tilsamans at mangla 4,3 milliónir, tá ið árið er úti.

Sparingarnar, sum vit ikki sluppu at seta í verk fyrr í ár, høvdu givið Strandferðsluni eina sparing uppp á 2,4 milliónir.

Fyrr gjørdi fíggjarmálaráðið av at taka almenn akfør úr trygging, so tað hevur Strandferðslan gjørt.

– Tað meta vit fer at kosta 600.000 krónur í ár, sum ikki eru roknaðar við frammanundan.

Kristian Davidsen vísur eisini á, at Smyril kom at krevja væl størri umvælingar enn upprunaliga met, tá ið hann var í dokk í vár. Talan var um brek, sum ikki sóust, fyrrenn teir fóru at taka sundur, men tey óvæntaðu brekini kostaðu 1,3 millión eyka.

Tað eru serliga hesar tríggjar eyka útreiðslurnar, sum gera, at stovnurin kemur at mangla 4,3 milliónir í ár.

### Hallið kann gerast enn størri

Men Kristian Davidsen leggur tó afturat, at hallið hjá Strandferðsluni kann blíva enn størri, tí í hasum 4,3 milliónunum hevur hon ikki roknað við, at lønirnar fara at hækka eftir samráðingarnar í oktober.

– Tað kann geva Strandferðsluni eyka útreiðslur í seinasta ársfjórðingi í ár.

Harafturat er heldur ikki roknað við øðrum, óvæntaðum umvælingum, men tekur nakað seg upp, verður fíggjartørvurin hjá Strandferðsluni enn størri.

Tó hevur Strandferðslan gjørt av at útseta allar umvælingar, sum kunnu bíða, til næsta ár.

Hann sigur, at eisini aðrir óvissar kunnu stinga seg upp. Eitt er farmaflutningurin ógvuliga nógv tengdur at, hvussu tað gongst í fiskivinnuni.

Samstundis hevur verkfallið kostað Strandferðsluni væl av inntøkum, tí tá varð ongin farmur fluttur, samstundis inntøkurnar hjá Bygdaleiðum eisini minkaði munandi.

Men, hvussu nógv, verkfallið kostaði, hevur Strandferðslan ikki gjørt upp enn.

Tað er eisini ein spurningur um, hvussu oljuútreiðslurnar verða, tí hækkar oljan aftur, førir tað eisini eyka útreiðslur við sær.

Stjórin á Strandferðsluni sigur, at hann hevur kunnað landsstýrismannin í vinnumálum, Bjarna Djurholm, um støðuna.

Men hann sigur, at fær Strandferðslan ikki eina eykajáttan, verður neyðugt at seta sparingar í verk og tað kann bara gerast við at skerja sigling hjá skipunum og koyring hjá bussunum.

## Bjarni Djurholm mælir til at Strandferðslan fær eykajáttan

**Politisku myndugleikin hevur noktað Strandferðsluni at seta sparingar í verk og tí má hon fáa eykajáttan, sigur landsstýrismaðurin í vinnumálum**

STRANDFERÐSLAN
*Áki Bertholdsen*



*Politiski myndugleikin noktaði Strandferðsluni at seta sparingar í verk og tað mugu bæði landsstýrið og Løgtingið taka avleiðingarnar av, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum*

– Strandferðslan má fáa eina eykajáttan í summar.

Tað heldur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í Vinnumálum.

Hann hevur fingið kunning um fíggjarligu støðuna hjá Strandferðsluni, sum vit greiða frá í greinini omanfyri, og nú fer hann at kunna Landsstýrið um málið.

Men hansara tilmæli er, at Strandferðslan fær eina eykajáttan.

Annars hava politikarar boðað frá, at eykajáttanir eiga ikki at koma upp á tal og í øllum førum skal peningurin, sum verður játtaður eyka, sparast onkra aðrastaðni.

Men Bjarni Djurholm vísir á, at Strandferðslan fyrr í ár vísti á ymsar sparingar, men tað var ikki politisk undirtøka fyri at seta tær í verk.

– Við at gera uppskot til sparingar, hava Strandferðslan og landsstýrismaðurin í vinnumálum roynt at liva upp til ásetingarnar í fíggjarlógini, men tað tók politiski myndugleikin ikki undir við.

– Og tað mugu so bæði Landsstýrið og Løgtingið taka avleiðingarnar av og játta Strandferðsluni meiri pening, sigur hann.

Kann tað henda, at peningurin skal sparast aftur á onkrum øðrum øki hjá Vinnumálaráðnum?

Tað er sjálvandi ein spurningur, sum má takast upp. Men støðan er tann, at Strandferðslan hevur sjálv víst á sparingar.

– Og tað vildi verið øvugt at nokta stovninum, sum skal spara, at seta hesar sparingar í verk fyri síðani at skarva burturav onkra aðrastaðni, sigur Bjarni Djurholm.

Men hann leggur afturat, at hann veit ikki í løtuni um peningur er settur av til onkur endamál, sum ikki verður brúktúr í ár, so at tað fer at loypa av onkra staðni.

# Fyrsti nýbygningur í sjeyti ár

**Rættuliga nógv fólk vóru savnað á keiini í Norðdepli, tá nýggi Gáshøvdi hjá p/f Kneysur á Viðareiði fyri fyrstu ferð kom til landið seinnapartin sunnudagin. Seinast eitt spildurnýtt skip heimahoyrandi á Viðareiði kom til landið var einaferð í 1930-unum**

MÓTTØKA
*Solby A. Eliasen*



*Rættuligur hátíðardámur var, tá nýggi Gáshøvdi hjá p/f Kneysur á Viðareiði kom til Hvannasunds seinnapartin sunnudagin*

**Norðdepil:** Rættuligur hátíðardámur var í bygdini, nú ein nýbygningur skrásettur á Viðareiði kom heim. Talan er um trolbátin Gáshøvdi, og menn siga, at hetta er fyrstu ferð í eini sjeyti ár, at eitt nýtt skip kemur, sum er skrásett á Viðareiði. Tað var ein løta at bíða, inntil nýggi trolbáturin sást koma inneftir firðinum, men tað gjørdi ikki nógv, tí veðurgudarnir vóru við sundafólki og viðoyingum henda dagin. Sólin skein, og tað rørdist ikki ein ond.

Nógvir smábátar fóru út eftir firðinum at taka ímóti, og somuleiðis vóru tveir kappróðrarbátar frá Nordepils- og Hvannasunds Róðrarfelag og tóku ímóti. Tað spildurnýggja seksmannafarið, Sundabáturin og gamla fimmmannafarið Ritan. Fløgg sóust allastaðni í bygdunum báðum, og nógv børn gingu eisini og runnu á keiini við fløggum í hondini.

Tá Gáshøvdi hevði lagt at, heilsaði Absalon í Buð skipinum og tess eigarum og ynskti teimum alt tað besta í framtíðini. Hann rópti eitt trýfalt longi livi eisini. Síðani takkaði Kári Kallsberg, stjóri í p/f Kneysur fyri móttøkuna. Hann var sera ovfarin av stórfingnu móttøkuni, sum skipið fekk. Klaksvíkar Hornorkestur var eisini komið til Norðdepils, og tey spældu nøkur løg. Tá tollvaldið hevði verið umborð og avgreitt síni viðurskifti, varð boðið umborð at hyggja at skipinum.

Eftir móttøkuna á keiini, varð hildið fram á hotel Norð á Viðareiði, har fólk fingu ein góðan bita at eta. Sum skilst vóru eisini heilt nógv fólk á Viðareiði.

### Góðar vónir

Nýggi Gáshøvdi er komin í flotan fyri gamla Gáshøvda, og hesin hevur so fingið somu loyvini, sum tann gamli hevði.

Kári Kallsberg sigur, at vónirnar hjá teimum eru sera góðar, nú nýtt skip er komið.

– Annars vóru vit ikki farnir í holt við hetta, sigur hann, tá Sosialurn fær hendur á honum um telefonina seint sunnukvøldið.

Hann greiðir frá, at umstøðurnar fyri manningina eru sera góðar umborð. Manningin fer at telja fýra ella fimm mans.

Nýggi Gáshøvdi er bygdur á skipasmiðju á Hafnafirði í Íslandi. Hann er 21,95 m langur, 6.5 m breiður og 3,3 m høgur. Hann er merktur 140 BT.

Tað eru brøðurnir Gunnar, Kári og Hans Jákup Kallsberg, sum eiga bátin. Og hann fer væntandi sín fyrsta túr týskvøldið.



*Tað eru teir tríggir brøðurnir, Gunnar, Hans Jákup og Kári Kallsberg, sum eiga Gáshøvda, sum er komin í flotan fyri gamla Gáshøvda*



# Ferðavinnan og mentanin tættari samstarv

**Bæði føroyingar og útlendingar vóru á einum máli um, at neyðugt er við nýhugsan á ferðavinnuøkinum. Eitt tættari samstarv millum ferðavinnuna og føroysku mentanina kundi verið til at styrkt bæði føroysku ferðavinnuna og mentanina**

MENTANAR-RÁÐSTEVNA
*Páll Holm Johannesen*



*Ein av spennandi fyrilestrunum á Mentanarstevnuni um vikuskiftið var um ferðavinnu og mentan. Báðir partar vístu á, at neyðugt var nógv betri samskipan í framtíðini, so báðir partar kunnu fáa størri gagn av hvørjum øðrum*

*Mynd. Jan Muller*

Um vikuskiftið hevur Norðurlandahúsið hildið eina forkunnuga mentanarráðstevnu. Stevnan var tann fjórða í røðini í samband við, at norðurlondini vilja kanna, hvussu langt norðurlendskur mentanarpolitikkur er komin, og hvussu hann skal skipast í framtíðini

Ein av spennandi fyrilestrunum á mentanarráðstevnuni um vikuskiftið var sunnudagin, har kjakast var um hugtakið kulturturismu. Kulturturisma er eitt vanligt fyribrigdi í londum uttanfyri Føroyar, meðan vit framvegis ikki hava tikið hugtakið til okkum. Kulturturisma er í stuttum um, hvussu mentan og ferðavinna kunna arbeiða saman fyri at stuðla hvørjum øðrum so báðir partar fáa sum mest burtur úr.

Føroyska ferðavinnan hevur altíð lagt stóran dent á at marknaðarføra føroysku mentanina, sum ein sjálvsagdan part av ferðavinnuni. Kortini eru mentan og ferðavinnan politiskt atskild, soleiðis skilt, at politisku myndugleikarnir hava orða atskildan ferðavinnu- og mentanarpolitikk, og taka ikki fyrivarni fyri at hesi í roynd veru hoyra saman. Á pallborðsfundinum sunnudagin kom týðuligt fram, at partarnir í ferðavinnuni meta hetta vera óheppi, tí ikki ber til at skilja hugtøkini at.

Bæði fólk innan ferðavinnuna og føroyska mentanarlívið fílast á, at partarnir ikki vita nóg væl av hvørjum øðrum, og at neyðugt er, at samskipanin gerst nógv betri í framtíðini. Hvussu hetta skal gerast vóru fólk rættiliga ymisk á máli um, og á pallborðsfundinum kom fram, at fólk innan føroyska mentan ikki vóru serliga áhuga í at verða marknaðarførd, sum ein sjálvsagdur partur av ferðavinnuni.

### Neyðugt við nýhugsan

Fólk innan ferðavinnuna søgdu seg ynskja, at Føroyar royndu at marknaðarføra seg sum annað enn nakrar grønar oyggjar, tí flest onnur lond hava eisini vakra nátturu. Neyðugt er tí við nýhugsan, so Føroyar sum ferðavinnuland fær onnur bein at standa á, enn bert náttúruna. Víst varð á teir mongu festivalarnar og føroyska myndlist sum góðar møguleikar, og sum avgjørt kundi lokkað fleiri útlendingar til Føroya.

Útlendsku áhoyrarnir vístu eisini á stóra týdningin, at føroyingar royndu at bróta úr nýggjum og royna nýggjar leiðir á ferðavinnuøkinum. Eisini róstu teir føroyingum fyri at duga væl at hildið aftur, so føroyska mentanin heldur ikki bleiv ov popput, sum bleiv tikið til. Hóast neyðugt var við nýhugsan, so er týdningarmikið, at vit ikki mistu okkum sjálvi burtur í marknaðarføringini av mentanina. Higartil hava føroyingar duga væl at funnið eina góða javnvág, og útlendingarnir vóna, at føroyingarnir framhaldandi halda fast við ta leiðá ferðavinnuøkinum.

# Tróndur Patursson sýna fram í Dublin

**Ein av fyrilestrarhaldarunum á Mentanarráðstevnuni, írin Patrick J. Murphy, er so hugtikin av Tróndur Paturssyni, at hann hevur keypt ein málning frá føroyska listamanninum**

MYNDLIST
*Páll Holm Johannesen*

Í samband við Mentanarráðstevnuna um vikuskiftið, hevur Tróndur Patursson fingið møguleika at sýna fram í stóra Guinness gallaríinum í Dublin komandi summar.

Tað er stórur áhugi fyri føroyskari list í Bretlandi, og í samband við framsýningina í Dublin, fer Tróndur eisini sýna fram í Aberdeen og London komandi summar.

Framsýningin á Guinness gallarínum er komin í lag gjøgnum íran Patrick J. Murphy, sum var ein av fyrilestrarhaldarunum í Norðurlandahúsinum um vikuskiftið. Hann er ein av samskiparunum á Guinness gallarínum, sum er eitt mest viðurkendu gallarínum í Írlandi. Gallaríið bjóðar vanliga listafólkum út øllum heiminum at sýna fram, og nú er greitt, at Tróndur Patursson verður at síggja í írska høvuðsstaðnum komandi summar.

### Selt málning

Patrick J. Murphy er so hugtikin av Tróndi Patursson, at írin sjálvur hevur keypt málning av føroyska listamálaranum. Talan er um ein miðalstóran málning, sum Tróndur kallar ein abstrakta náttúrulýsing.

# Útnorður raðfest hægri

**Norðurlond skifta fokus. Frameftir verður útnorður og samstarv við grannaøkini í útnorði raðfest ovarlaga, samdust norðurlendsku ráðharrarnir um í Stokkhólmi í síðstu viku. Avrátt var eisini, at norðurlond fara at viðurkenna navnalóggávu hvør hjá øðrum**

NORÐURLOND
*Ingi Rasmussen*

Norðurlendsku ráðharrarnir vilja raðfesta útnorður og samstarv við grannaøkini. Tað kom fram á einum fundi millum norðurlendsku samstarvsráðharrarnar í Stokkhólmi hósdagin, tá ein arbeiðsbólkur um útnorður legði úrslitið av sínum arbeiði fram.

Føroyar og Íslandi hava leingi strongt á fyri at fáa norðurlond at skifta fokus. Nógv samstarv er vent eystureftir og við ES, meðan samstarvið við okkara grannaøki fyri sunnan og vestan – Skotland, Hetland, Orknoyggjar, Írland, Nýfundland og onnur øki – hevur verið fyri skerdan lut.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at farið verður undir at fremja hetta samstarv við ítøkiligum verkætlanum. Innan havumhvørvi, tilfingisumsiting, veðurlagsbroytingar, útbúgving gransking, mentan, heilsu og samferðslu.

Norðurlendsku ráðharrarnir hava sett hetta fram sum eina av fimm serligum raðfestingum, verður upplýst av løgmansskrivstovuni.

– Vit hava strembað eftir hesum í skjótt fimm ár og hava nú fingið týdningin av slíkum samstarvi viðurkendan. Hetta er eitt dømi um, at vit skulu gera og taka ábyrgd millum hini norðurlondini og ikki bert krevja og taka ímóti, sigur Høgni Hoydal, landsstýrismaður við norðurlendskum málum, sum fegnast um úrslitið.

Á fundinum í Stokkhólmi varð eisini uppskot samtykt um at javnseta føroyingar, álendingar og grønlendingar, tá tað snýr seg um rættin til at útbúgva seg hjá hvørjum øðrum í norðurlondum.

Fyrrverandi danski forsætisráðharrin, Poul Schlüter, hevur fingið til uppgávu at arbeiða burturav við at rudda allar forðingar burtur, so norðurlendingar fáa javnbjóðis rættindi í londunum hvør hjá øðrum. Dømi um hetta kann vera, at viðurkenna navnalóggávu, so eitt nú føroyingar kunnu brúka føroysk nøvn, hóast teir búgva í øðrum norðurlandi, soleiðis sum Høgni Hoydal hevur skotið upp.

Poul Schlüter tók beinanvegin málið upp og fer sambært Løgmansskrivstovuni at skjóta upp eina felags avtalu millum norðurlond um navnalóggávu.

